## Hjól hjá Atlantic punkteraði undir lending

Eitt hjól á einum flogfari hjá Atlantic Airways skrædnaði, tá ið tað setti seg á fløgvøllin í Vágunum seinnpartin. Flogfarið var júst komið úr Billund, tá ið óhappið hendi. Nakað av royki var at síggja frá hjólinum undir vinstra vongi, og tríggir sløkkiliðsbilar vóru skjótir á staðnum. Teir fylgdu allir flogfarinum á sítt pláss, og einki annað spurdist burturúr hendingini, sum allarhelst má setast undir bólkin ´hendiligt óhapp´.



## Klaksvíkar Kommuna fingið MySpace

Alsamt fleiri streyma til heimasíðuna MySpace, sum er ein frálíkur portalur at hava hjá hvørjum einum fólki. Eisini eru nógvar fyritøkur komnar til, og nú er eisini ein kommuna komin uppí. Tað er Klaksvíkar Kommuna, sum hevur tikið stig til at upprætta sær eina vangamynd á síðuni. Endamálið sigur kommunan vera, at røkka einum serligum málbólki á síðuni, helst tí serliga nógvur ungdómur heldur til á síðuni. MySpace-síðan hjá Klaksvíkar kann síggjast á www.myspace.com/klaksvik

# Árni Winther vann kirkjukapping

**Tað vóru Árni Winter Arkitektar, sum vunnu kappingina um besta uppskotið til nýggja kirkju á Glyvrum**

KAPPING

*Kári Mikkelsen*
*karim@sosialurin.fo*

15 uppskot vóru komin inn til kappingina um nýggja kirkju á Glyvrum, og seinnapartin í gjár varð almannakunngjørt, hvørjir vinnararnir vóru.

Arkitektavirkið hjá Árna Winther fekk 150.000 krónur fyri at gera besta uppskotið, og Heidi Poulsen og Map-arkitektar fingu aðru virðisløn, 90.000 krónur, fyri næstbesta uppskotið.

Øll uppskotini kunnu síggjast í fimleikarhøllini í Glyvra Skúla fram til sunnudagin frá klokkan 16 til 20

Eftir at avgerð varð tikin um at vraka verandi kirkju á Glyvrum, sum er vorðin ov lítil og ótíðarhóskandi, og ein útbygging ikki varð mett at vera rætta loysnin, útskrivaði kirkjuráðið á Glyvrum arkitektakapping um nýggja kirkju.

Verandi kirkja, sum tekur 600 fólk, verður standandi til nýggja kirkja, ið verður bygd norðanfyri og fer at taka 750 fólk, er liðug. Harafturat verður kjallari gjørdur undir nýggju kirkjuna.





*Frá móttøkuni í Glyvra Skúla í gjár, har virðislønir vórðu latnar fyri bestu uppskotini til nýggja kirkju*

*Myndir: Sunva Ey. Lassen*